gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Tað gongur ikki altíð sum prestur prædikar

**Tað man vera langt síðani, at úrslitini í einum umfari hava verið so óvantað, sum tey vóru í triðja umfarinum, tá tvey av oddaliðunum taptu á heimavølli, og tað liðið, ið hevur verið mett sum hitt vánaligasta, fekk alt á útivølli**

HB fer ikki at missa nógv stig í hesum kappingarárinum. Soleiðis hava fleiri mett, eftir at havnarmenninir í tveimum teimum fyrstu umførunum fingu alt ímóti B68 og KÍ. Fríggjadagin taptu teir á heimavølli ímóti GÍ. Hetta var fyrsta ferðin síðani 1991, at GÍ vann á HB á útivølli. GÍ sigurin hevur við sær, at gøtumenn eru einsamallir á odda í bestu deildini. Teir hava fult stigatal, og teir hava ikki verið har á støðutalvuni, sum teir eru nú, síðani tað eftir átjanda umfarið í 1996 var greitt, at GÍ fyri fjórðu ferð á rað hevði vunnið FM.

Hesa ferð høvdu tað neyvan verið fleiri vinnarar í einari føroyskari veddingartænastu. At B36 vann 2–0 á Mølini á Eiði var ikki ørðvísi, enn tað kundi roknast við.

Um avrikini í teimum báðu fyrstu umførunum vórðu nýtt sum grundarlag at meta út frá, so vóru øll hini úrslitini øðrvísi, enn tað kundi roknast við. FM vinnararnir, sum høvdu fingið fult í tveimum umførum, taptu á heimavølli ímóti KÍ, sum einki hevði fingið burturúr tveimum umførum.

B68 hevði skinklað nógv, áðrenn teir fóru in ní Heiðar. Har vóru teir leikliga omaná og fingu eitt stig. FS Vágar hevði tapt 6–0 í fyrsta útidystinum, og B71 hevði vunnið 1–0 í fyrsta heimadystinum. Fótbóltslagið í Vágum tóktist einki serligt, men fríggjadagin eydnaðist teimum at leggja ein skugga á sølustevnuna á Sandi.

## Royndirnar ræða

Í HB mundu teir neyvan rokna við at tapa ímóti GÍ At grannarnir síðani meiri ella minni sendu dreymin um enn eina steypafinalu heilt langt burtur, var eyka skelkur hjá HB. Í báðum førunum var talan um taktiskt meistaraverk. Johan Nielsen og Piotr settu lyklaspælararnar hjá HB út av spælinum, og tað legði út á bera jól, at HB hevur veikleikar.

Í steypakappingini fáa teir í HB ein nýggjan møguleika. Tá kann tað fara at vísa seg, at málið hjá Halli Danielsen sunnudagin hevði stóran týdning.

Í landskappingini hevur tapið á heimavølli elvt til, at tey í HB eru farin at venda eyguni ímóti sær sjálvum. Ein spurningur er, hví Jón Rói Jacobsen, sum bara var á vøllinum í 40 minuttir og av HB viðhaldsfólkunum kortini varð kosin besti maður á teirra liði, ikki spældi alla tíðina. Eyguni og spurningarnir verða snaraðir ímóti venjaranum. HB hevur breiðan hóp, undan fríggjadegnum var Jón Rói eitt sindur skaddur, og venjarin skuldi eisini hugsa um, at ein nýggjur týdningarmikil dystur var a skránni longu sunnudagin.

Í fjør tapti HB tveir heimadystir, meðan teir ongantíð taptu á útivølli. Tapini á heimavølli kostaðu FM heitið. Spurningurin er, hvussu tað fer at roynast í ár.



*Oddadysturin komandi vikuskifti verður í Gøtu, har B36 kemur á vitjan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Vinnarar og taparar

Nú ein sættingur av kappingini er avgreiddur er tað bara eitt lið, sum hevur fult stigatal. Tað er GÍ. Tvey onnur lið hava ikki tapt. Annað er B36, sum hevur vunnið tvær ferðir og spælt eina ferði javnt. Í løtuni tykjast hesi bæði liðini at vera best fyri. B36 hevur breiðan hóp og hevur bæði steypafinaluna og landskappingina at hugsa um.

GÍ hevur ikki so nógv fólk. Tí hevur tað avgerandi týdning hjá teimum, at allir teir spælararnir, sum vóru ímillum teir fyrstu ellivu fríggjadagin, eru tøkir hvørja ferð. GÍ tykist vera meiri viðkvæmt yvirfyri skaðum og kortum, enn havnarfeløgini og fleiri av hinum liðunum.

NSÍ hevur ikki roynt at tapa, men saman við tveimum øðrum liðum hava teir heldur ikki roynt at vinna. Hini bæði liðini eru B68, sum ivaleyst fer at vinna nakað skjótt og so EB/Streymur. Lykladystirnir hjá teimum verða ivaleyst teir ímóti B71 og FS Vágum. Fyrsta lykladystin vann B71 á heimavølli ímóti EB/Streymi. Tann næsta tapti B71 á heimavølli ímóti FS Vágum. Triði lykladysturin verður á skránni komandi sunnudag. Tá skal EB/Streymur spæla í Miðvági.

Í fjør hittust KÍ og NSÍ fleiri ferðir eftir stuttari tíð. Soleiðis verður tað eisini í ár. Eftir fyrru hálvfinaluna síðsta sunnudag skulu teir í NSÍ longu sunnudagin norður aftur til Klaksvíkar at spæla landskappingardyst, og annan hósdag skal KÍ til Runavíkar at stríðast í seinnu hálvfinaluni. Tað verður ikki KÍ, sum fer at fáa ágóðan av, at tveir NSÍ spælarar sóu reytt í steypadystinum sunnudagin. Sjúrður Jacobsen og Ian Højgaard vera leikbannaðir, tá NSÍ í annaðkvøld skal spæla útsetta dystin í Miðvági.

VB og HB endaðu á tveimum teimum ovastu plássunum í fjør. Komandi sunnudag hittast tey í Gundadali. Í fjør royndi hvørki av hesum liðunum at tapa tveir landskappingardystir upp í slag.

Oddadysturin næstu ferð verður í Gøtu, har B36 fer at vitja. B68 fær vitjan av B71, og annað vikuskifti skulu toftamenn norður til Eiðis.

Úrslitini í triðja umfarinum góvu ábending um, at tað kann so skjótt vera soleiðis, at tey, sum hava verið fremst, detta longur niður, og at tey í botninum lætta sær á. Tað er sjarman við fótbóltinum.




*Í HB mundu teir neyvan rokna við at tapa ímóti GÍ, men Uni og teir máttu hyggja langt eftir stigunum dýra biðjidag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

gult15 cyan15 magenta15 svart15



VB-KÍ:

# Útlendingarnir hava so sera nógv at siga

**VB álopið var tannleyst, tá pólversku álopsmenninir ikki vóru við, og pólverski miðvallarin skoraði einasta málið. Hjá KÍ skoraði nýggi jugoslavin bæði málini**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar og vágbingar hava tað til felags, at teir eiga nógvar góðar fótbóltsspælarar. Teir hava eisini tað til felags, at onkrir av lyklaspælarunum eru útlendingar. Millum annað er Tomislav Sivic spælandi venjari hjá KÍ. Hann hevur verið í Føroyum síðani 1996. Tað fyrsta árið var hann spælandi venjari hjá vágbingum.

Fríggjadagin vóru klaksvíkingar í góðum lagi, tá teir fóru aftur um Suðuroyarfjørð. Vágbingar vóru í ringum skørum. Bæði hýrurin á klaksvíkingum og tann á vágbingum var væl skiljandi. KÍ vann landskappingardystin 2–1, og tað var ikki fyrrenn í allar seinastu løtuni, at teir tiltuskaðu sær stigini.

VB kom á odda, tá tað restaði eitt korter, men so gekk tað hjá vágbingum, sum tað gjørdi hjá Arsenal ímóti Liverpool leygardagin. Seinastu sjey minuttirnar fekk KÍ tvey mál. Tað seinna fingu teir, tá tað vóru farnir meiri enn tríggir minuttir út um vanligu leiktíðina.

## Saknurin

Tá VB í fjør vann fyrsta FM heitið, høvdu teir eitt homogent lið. Men tað var eyðsýnt so at siga hvørja ferð, at álopið var ógvuliga vandamikið. Tað ráddi ofta um at fáa bóltin fram til Krzystof Popczynski og Robert Cieslewicz. Tilsaman skoraðu teir 23 av teimum 42 málunum, sum VB fekk, og hjá mongum mundi tað kennast upplagt, at spælandi venjarin var besti maður í kappingini.

Fríggjadagin sást væl, hvussu stórur saknurin var í teimum. Popczynski var so mikið darvaður av skaða, at hann helt seg ikki til at spæla. Palli Augustinussen var í álopinum saman við Robert Cieslewicz, men tað var bara í ein hálvan tíma. So sá pólverski álopsmaðurin reytt fyri tápuliga hevnisøku. So kendu vágbingar seg noyddar at umskipa, og harvið varð álopið ikki serliga vandamikið.

Hóast vágbingar í ein tíma vóru undirmannaðir, so høvdu teir fleiri møguleikar enn gestirnir. Marner Richardt – eina ferð í hvørjum hálvleikinum – og Palli Augustinussen vóru í so mikið góðum støðum, at teir áttu at havt skorað. Men í VB, sum hevði Tórður Holm sum sera eyðsýndan miðvallara, vóru teir óneyvir, og Meinhard Joensen stórspældi í KÍ málinum.

Einasta VB málið, sum kom eitt korter undan leikloki, stóðu útlendingarnir fyri. Altíð raski og drúgvi, Pedrag Zivkovic fóru ígjøgnum í høgru, og Marek Wierzbicki, sum í 1999 var við til at vinna FM heitið til Klaksvíkar, og sum eisini spældi við KÍ í fjør, tamdi ímillum tríggjar fyrrverandi viðspælarar, áðrenn hann skoraði.

## Vorðið sum fongur

Klaksvíkingar vóru longu undir upphitingini darvaðir. Liðformaðurin, Allan Joensen, sum hevur verið ímillum hollastu stuðlarnar í ár, og sum var ætlaður til pláss í miðverjuni, tók seg stutt undan dystarbyrjan aftur. Gamli skaðin í hælsinuni gjørdi um seg á harða undirlagnum, og so gjørdi Tomislav Sivic av, at Andrass Jacobsen, sum ongantíð áður hevði verið á besta liðnum, skuldi royna at hava stutt tjóður á Robert Cieslewicz.

Tað megnaði hann væl ta løtuna, sum pólverjin var á liðnum.

KÍ hevði ikki fatur á langa endanum, sjálvt um teir vóru yvirmannaðir, og tá teir komu á vøllin eftir steðgin, høvdu teir broytt um liðið, tí vágbingar høvdu mist ein álopsmann. Hjalgrím Elttør, sum kanska hevur verið mest eyðsýnda álopsvápnið hjá KÍ higartil í ár, hevði stitið á beinkinum alt fyrra umfarið. Hann skuldi fáa eitt sindur av hvíld, áðrenn fyrru hálvfinaluna. Tá ein tími var farin, kom ein annar álopsmaður, Eyðun Klakstein, á vøllin.

Men hóast KÍ harvið styrkti nógv um álopspartin, so var tað VB, sum hevði størstu møguleikarnar, og tað var ikki av leið, at teir komu á odda. Síðstu løtuna rindaðu vágbingar fyri, at teir so leingi høvdu runnið og stríðst tíggju ímóti ellivu.

KÍ, sum hevði havt bóltin ikki so lítið, men sum ikki hevði megnað at spælt seg til upplagdar møguleikar, spenti álopsbogan uppaftur meiri, og tað eydnaðist at fáa tvey mál og harvið at fáa trý sera týdningarmikil stig. Nýggi álopsmaðurin, sum eina góða løtu hevði verið miðvallari, hevur víst gott hegni, síðani hann kom til Klaksvíkar, og hesa ferð vísti hann við tveimum málum, at hann kann gerast ein stór hjálp hjá Tomislav Sivic í royndini at snikka eitt nýtt KÍ lið saman.

Fyrra málið fekk hann eftir skjótt Eyðun Klakstein innkast í vinstru og samanspæl ímillum Tomislav Sivic og Jan Joensen, sum sendi flatt í brotsteigin. Alexander Djordjevic slapp at temja, áðrenn hann skoraði. Og í síðstu løtu var hann aftur upp á spæl. Uppspæl í høgru ímillum Jan Andreasen og Harley Bertholdsen endaði við, at hesin seinni sendi innfyri, og heilt tætt undir málinum stýrdi Alexander – í hesum førinum Hin Mikli hjá klaksvíkingum – bóltinum um strikuna.




*Klaksvíkingar vóru leingi hart kroystir, men at enda megnaðu teir at skræða seg leysar av vágbingum, og fáa fyrsta sigurin á árinum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### VB-KÍ 1-2 (0-0)

1-0: Marek Wierzbicki 75

1-1: Aleksander Djordjevic 83

1-2: Aleksander Djordjevic 90

Dómari: Suni Johansen (SÍF)

VB: Bjarni Johansen – Pedrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Marner Richardt, Jón Gærdbo, Marek Wierzbicki, Tórður Holm, Jón Pauli Olsen – Palli Augustinussen, Robert Cieslewicz

KÍ: Meinhard Joensen – Andrass Jacobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Fríðin Ziskason, Símun Joensen – Alexander Djordjevic, Ove Nysted

# Zwolle hevur ferð á

**Súni Olsen varð innskiftur, tá FC Zwolle vann týdningarmikland dyst um vikuskiftið**

HOLLAND

*Jákup Mørk*

Tað gongur við fullari ferð framá hjá Súna Olsen og liðfeløgunum í FC Zwolle. Liðið hevur veruliga fingið ferð á síðani vetrarsteðgin, og úrslitið av hesum speglast eisini aftur á stigatalvuni. Har er Zwolle nú at finna á triðovasta sessinum, og hóast fremsta liðið er nakað burturi, eru nú bert tvey stig upp til næstfremsta sessin. Liðið á næstovasta plássinum er Excelsoir, og tað vóru júst hesir, sum vitjaðu Zwolle um vikuskiftið. Zwolle vann dystin 2-1, men tað var ikki fyrr enn Súni kom á vøllin, at heimaliðið fekk takið a dystinum.

Súni kom á vøllin í 53. minutti, tá Zwolle var aftan fyri 1-0, men við tveimum málum seinasta hálva tíman, fingu teir á heimaliðnum kortini koppað øllum á høvdið.

Við sigrinum styrkti Zwolle sær um sessin í oddinum, og sum støðan er nú, so verða teir millum tey átta liðini, sum fara at kappast um, hvør skal fylgja við vinnararnum av deildini upp í sonevndu heiðursdeildina. Um so er, at hetta eydnast, skrivar Súni Olsen helst føroyska fótbóltssøgu. Higartil hevur bert ein føroyingur spælt í hollendskum fótbólti. Jan Allan Müller leikti við Go Ahead Eagles, men eisini hetta var í næstbestu deildini, so enn hevur eingin føroyingur roynt seg í bestu deildini, sum tó kortini ikki er heilt óføroysk. Marc Nygaard, sum spælir við Roda, er nevnliga hálvur tvørámaður, men tá hann longu hevur verið í dysti fyri danska landsliðið, fáa føroyingar ikki gleði av fótbóltsevnum hansara.